**Sóttarhald, sjálvboðið ella álagt**

Við frástøðu steðga vit korona Covid-19

Hesi ráðini eru umráðandi, um tú ert í vandabólki

# Tilmæli, sum galda fyri øll

- Tit, sum búgva saman, kunnu vera saman sum vanligt
- Tú kanst fáa vitjan, men fá fólk í senn
- Tú kanst fara út, men halt frástøðu
- Frísk børn kunnu vera saman við nøkrum fáum børnum
- Minst til gott hondreinføri og hosta og njós í ermuna!
- Latið vera við at heilsast við lógvataki ella at klemmast
- Latið vera við at stigmatisera nakran ella útihýsa nøkrum

## Heimauppihald, aftan á ferðing

- Tú ert heima við hús
- Tú fert ikki til arbeiðis
- Tú eigur ikki at fáa vitjan
- Tú eigur ikki at fara til handils, ørindi ella av matriklinum, har tú ert í uppihaldi
- Tit gera reint, serliga á vesinum og í køkinum
- Tit hugsa serliga um hondreinføri
- Fólki, sum eru í vandabólki, skalt tú als ikki hava beinleiðis samband við
- Tey, sum tú býrt saman við, eru ikki í heimauppihaldi
- Um tú, fært sjúkueyðkenni í andingarleiðini, skal tú ringja til lækna

## **Sóttarhald, tá ið tú hevur havt samband við persón við covid-19**

- Tú avbyrgir teg frá øðrum heima
- Tú fert ikki til arbeiðis, ørindi ella av matriklinum, har tú ert í sóttarhaldi
- Halt frástøðu frá hinum í húsunum
- Tey, sum tú býrt saman við eru ikki í sóttarhaldi, men tey skulu fylgja við síni heilsustøðu
- Gerið ofta reint á vesinum og í køkinum

## Álagt sóttarhald, tá ið tú hevur fingið covid-19

- Tú avbyrgir teg frá øðrum húsnum
- Tú fert ikki til arbeiðis, ørindi ella av matriklunum, heldur ikki tey, sum tú býrt saman við
- Tú skalt ikki hava beinleiðis samband við onnur fólk – heldur ikki tey, tú býrt saman við
- Tú skalt vera í sóttarhaldi 14 dagar eftir, at tú hevur fingið staðfest covid-19
- Tosa við læknan hjá tær um, hvussu tú fylgir við tíni heilsustøðu